Sjúkrarøktarfrøðingar til Økispsykiatriina

Psykiatriski depilin søkir eftir tveimum sjúkrarøktarfrøðingum á starvsbrøki 0,8 til økispsykiatriska toymið við tænastu í Eysturoynni:

- eitt fast starv frá 1. mars 2011
- eitt avloysarastarv vegna barnsburð frá 1. mars 2011 til og við 31. desember 2011

Í økispsykiatriska toyminum eru í løtuni sjey sjúkrarøktarfrøðingar, sum arbeiða út frá viðtalum í Runavík, Hvalvík og Tórshavn í tøttum samstarvi við onnur toymi á Psykiatriska deplinum.

Psykiatriski depilin er í einari mennandi broytingartíð, har arbeitt verður við visjónini "Samskipaða røkt og viðgerð". Hetta merkir, at Psykiatriski depilin hevur ment eina toymisskipan, ið tekur støði í uppgávum, sum depilin hevur og í tí tilfeingi og teimum førleikum, sum eru á staðnum. Eitt av endamálunum er at fáa øll starvsfólk við í hetta menningararbeiði. Í løtuni verður arbeitt víðari við at menna dygdina, sjúklingagongdir og tað ambulanta virksemið. Psykiatriski depilin arbeiðir tvørfakligt og tvørsektorelt, har toymisskipan krevur, at starvsfólkini kunnu innganga í pliktað samstarv í ymsum toymum í mun til teirra uppgávu.

Arbeitt verður alsamt við at menna og útbyggja Økispsykiatriina, sum ætlandi skal fevna um alt landið. Farið er undir at skipa tvørfakliga útbúgving í kognitivum viðgerðarhættum, og fleiri menningartiltøk eru sett í verk, eins og nýggj røktar- og viðgerðartilboð eru komin ella eru ávegis. Talgilda heilsuskipanin er sett í verk.

Psykiatriski depilin leggur dent á:

- at viðvirka til at skapa góðar karmar til fakliga og persónliga menning
- at skapa eitt trygt og gott arbeiðisumhvørvi, sum er tengt at opinleika, ídni og umhugsni

Vit søkja eftir starvsfólki, sum:

- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- hevur royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina. Hevur áhuga at arbeiða við sjúklingum, sum seta høg krøv til dygdina í røktini og viðgerðini
- kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur hug at arbeiða á einum depli, sum er í støðugari menning
- er opin, vinarlig/ur og fyrikomandi
- hevur góð samstarvsevni bæði monofakliga og tvørfakliga

Psykiatriski depilin kann bjóða:

- góða innleiðslu
- eitt mono- og tvørfakligt arbeiðsumhvørvi, sum er sermerkt av yrkisføri, opinleika, álit og virðing
- eitt dynamiskt fjølbroytt og spennandi arbeiði við nógvum avbjóðandi serumráðum og møguleikum fyri kliniskum og ábyrgdarfullum uppgávum
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- ein depil í støðugari menning bæði fakliga og fyriskipanarliga

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Randi Borðoy, tlf 234577, t-post: lsranbo@ls.fo ella til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Bergit Weihe, lokal 4102, t-post: lsberwe@ls.fo

Umsóknarfreistin er 11. februar 2011 kl. 12.00

Sosialurin 341800

Áður lýst størv:

Sjúkrarøktarfrøðingar til B8
Umsóknarfreistin er 31. jan. 2011 kl. 12.00

Sjúkrarøktarfrøðingur til Kommunulæknavaktina
Umsóknarfreistin er 31. jan. 2011 kl. 12.00

Introstarv í Intern Medisin
Umsóknarfreistin er 31. jan. 2011 kl. 12.00

Hjálparlækni í almen kirurgi
Umsóknarfreistin er 15. febr. 2011

Summarfrítíðaravloysarar
Umsóknarfreistin er 18. febr. 2011

Bioanalytikarar
Umsóknarfreistin er 18. febr. 2011

Yvirlækni í anæstesiologi og intensiv terapi
Umsóknarfreistin er 1. mars 2011

Introstarv í Pædiatri
Umsóknarfreistin er 12. apríl 2011

Gransking & menning

Radiografar/Røntgensjúkrarøktarfrøðingar

Á Røntgendeildini er eitt avloysarastarv vegna barnsburð leyst at søkja til setan 16. februar 2011 til og við 15. september 2011 ella eftir avtalu.

Eisini søkja vit eftir summarfrítíðaravloysarum í tíðarskeiðinum 1. juni 2011 til og við 30. september 2011. Bæði størvini eru fulltíðarstørv við tilkallivakt frá heimi, kvøld/nátt og vikuskifti.

Á Røntgendeildini verða umframt vanligar konventionellar kanningar gjørdar:

- mammografi
- CT-skanningar
- ultraljóðkanningar
- MR-skanningar

Førleikakrøv

- prógv og góðkenning sum radiografur/røntgensjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga fyri arbeiðinum á deildini

Vit kunnu bjóða

- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Ragnu Reinert, deildarleiðara, lokal 5507, lsragre@ls.fo

Umsóknarfreistin er 11. februar 2011

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

Landssjúkrahúsið
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn